# Vilt tú verða sendifólk fyri Norðurlendska samstarvið "Unge sprogpiloter i Norden"? So er at halda teg framat!

"Unge sprogpiloter i Norden" er eitt samstarv millum skúlar í Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi og Føroyum. Endamálið er at kenna sínar grannar innan mál og mentan. Vitjað verður í øllum londum. Hvørja ferð eru 6 næmingar úr hvørjum landi við.

Fyrst í oktober 2023 høvdu vit vitjan í Føroyum, í apríl 2024 vóru vit í Nurmes, Finnland og í september 2024 vóru vit í Askøy, Noregi.

Næsta ferð gongur til Gøtuborg, Svøríki og hon verður í mai 2025. Fyri hvørja ferð er eitt evnið, sum øll londini arbeiða við, einsæris og í felag. Næsta evni verður fólkaræði. Tit skulu búgva heima hjá svensku næmingunum. Man kann ikki sjálvur velja, hvar man skal búgva ella skifta um hús eftir at man er komin.

Tit skulu ganga í skúla og samstarva við svensku, norsku og donsku næmingunum. Við á ferðini eru tríggir lærarar frá skúlanum, herímillum Birita Sigmundsdóttir og Sara Dybvad. Næmingar, sum sleppa við, fara at arbeiða við evninum áðrenn ferðina. Tá tit eru í Svøriki, skulu tit gera eina Atlantbib-bók saman við hinum næmingunum.

Um tú vil vita meira, kanst tú hyggja eftir myndum í hádeild, tosa við Biritu og Saru ella við næmingar, sum vóru við í Noregi (Sára og Anja 9a, Súsanna 9b, Maria og Brandur 8a og Marius 8b)

Um hetta hevur tín áhuga skalt tú senda okkum eitt video, har tú á **norðurlendskum** máli greiður okkum frá:

- **Hvør tú ert**
- **Hví tú ert eitt gott sendifólk**
- **Hví tú vilt læra meira um mál og mentan í Norðurlondum**

Umsóknin kann sendast til birita.sigmundsdottir@skulin.fo **áðrenn 1. Mars**. Minnist eisini til at senda eina váttan frá foreldrum/verja.

Vit gleða okkum at hoyra frá tær!

Birita Sigmundsdóttir og Sara L. Dybvad